**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar til Psyk. D1

Eitt fast starv á starvsbrøki 0,7 er leyst at søkja til setan 1. mai 2006 og eitt farloyvisstarv á starvsbrøki 0,5 í náttarvakt, er leyst at søkja frá 1. mai til og við 31. august 2006.

Deildin er ein opin 5 daga psykiatrisk móttøkudeild við 14 seingjaplássum. Arbeiðið er skipað eftir kontaktpersónsskipanini og eru vit í gongd við at innarbeiða kognitiva viðgerð sum arbeiðshátt. Vit raðfesta samstarvið, trivnaðin og fakligu menningina høgt. Arbeiðsumhvørvið er avbjóðandi og spennandi.

**Krøv til umsøkjaran**
prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
royndir og fakligan áhuga innan psykiatrisku sjúkrarøktina
góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- góða innleiðslu
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til deildarleiðaran, Jóngerð M. Nielsen á telefon 304500, lokal 4021, e-post: jomani@lsh.fo ella leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin, Bergit Weihe, lokal 4102, e-post: bergitw@ahs.fo bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 25. apríl 2006 kl. 12.00
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og Starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn,** merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikkja á leinkjuna "starvsfólk"*

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar og heilsu-røktarar/pleygarar til D5/D6

Eitt avloysarastarv á 0,5 í náttarvakt og eitt avloysarastarv á 0,7 í kvøld- og náttarvakt, bæði størvini eru frá 1. mai til og við 31. august 2006.

Deildin er ein psykiatrisk rehabiliteringsdeild, har arbeitt verður eftir miljø-terapeutiskum meginreglum og kontaktpersónsskipanini. Arbeitt verður fram ímóti, at geva sjúklinginum økt sjávbjargni og við tíðini møguleikan at flyta í egnan bústað. Deildin er í støðugari menning, og tað starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar, bæði innan- og uttanhýsis.

**Krøv til umsøkjarar:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur/heilsurøktari/pleygari
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan tað psykiatriska økið

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakligu menningina
- góða innleiðslu

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til Liss Jakobsen, deildarleiðara, tlf. 304500, lokal 4005 ella Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, e-postur mailto: bergitw@ahs.fo bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 25. apríl 2006 kl. 12.00
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og Starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn um starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikkja á leinkjuna "starvsfólk"*

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Stuðulsskipanin fyri vaksin*

## ENDURLÝSING
# Sosialráðgevi/ ráðgevi
## til stuðulsskipanina fyri vaksin

Eitt starv sum Sosialráðgevi/ráðgevi á Stuðulsskipanini fyri vaksin, undir Heimarøktini og Serforsorgini, verður hervið lýst leyst.

Stuðulsskipanin fevnir um stuðul til umleið 114 heimabúgvandi brúkarar, svarandi til umleið 42 fulltíðarstørv.

**Talan er um avloysarastarv í tíðarskeiðnum: 1. juni – 31. desember 2006.**

**Starvsuppgávur:**
- At ráðgeva og vegleiða
- Samskipa stuðulin, tá fleiri starvsfólk eru inni í myndini
- Viðgera nýggjar umsóknir
- Ráðgeva feløgum og stovnum
- Endurmeta ta hjálp, sum er veitt einum brúkara

**Vit søkja eftir einum starvsfólki, ið:**
- Hevur vitan og royndir innan sosiala øki
- Hevur áhuga at arbeiða við brekaðum
- Dugir at skapa positivt og virðiligt samband við brúkaran
- Dugir at arbeiða skipað og miðvíst
- Dámar at arbeiða bæði sjálvstøðugt og tvørfakliga
- Er sálarliga væl fyri og dámar avbjóðingar
- Er uppfinningarsamt og dugir at umstilla seg skjótt

**Vit bjóða:**
- Eitt mennandi arbeiði, har nógv er at gera
- Eitt arbeiðsumhvørvi, har pláss er fyri látri
- Vegleiðing
- Supervisión

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Stuðulsskipanin fyri vaksin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Stuðulsskipanina á tlf. 354020 og tosa við Odu Jóhansdóttir, virkandi leiðara ella við Sofíu Jespersen virkandi varaleiðara.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Stílað: Oda Jóhansdóttir
Løkjatún 1
160 Argir

**Umsóknarfreistin er: 24. apríl 2006.**

*Gravarhjálp*
*Marknagilsvegur 86 · 100 Tórshavn*
*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*herman@post.olivant.fo*

**Vit útinna allar uppgávur í sambandi við eina jarðarferð frá byrjan til enda**

- Eisini sangir, blómur og kransar
- Vit syrgja fyri sangarum *(í Tórshavn)*
- Vit framleiða okkara egnu kistur *(veita um alt landið)*
- Skipa fyri líkflutningi til og úr Føroyum
- Skipa fyri líkbrenning
- Hjá okkum kanst tú bestemma **tín síðsta vilja**

Sosialurin 341800

# Frá Fylking Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður leygardagin 29. apríl kl. 15.00. Ská sambært lóg felagsins.

**Fylking**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo